gult cyan magenta svart



Arkiv Rediger Vis Meddelelse Format Funktioner Vindue Help 10:30 Outlook Express

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Indbakke

Ernst Olsen, Reykjavík ernst_o@yahoo.com

**TELDUBRÆVIÐ**

Dagur 27.02.01

til: birgir@sosialurin.fo

Evni: Vikuskifti

# Gorbachev og Reagan vóru her

Tað var kalt, eini 10-12 stig undir, tá eg trein úr Atlansflog, og kuldin var verandi næstan 14 dagar fram. Ógvuliga myrkt var eisini, men tað gjørdi ikki so nógv, tí almikið pyntiljós var um allan býin.

Serliga onkur ávísur reykjavíkarbúgvi er kendur fyri at tendra serliga nógv ljós kring húsini, í trøunum, á takinum — fleiri túsund í tali. Eisini sjálvur Rudolf við tí reyðu nøsini lýsti so hugagóður mitt í rokanum. Mær var tó sagt, at hetta var ikki so ógvusligt sum undanfarin ár, tí hesin sami maðurin, ið hevur hjarta av elektriskum jólaljósi, var dottin og hevði brotið armin, tá hann royndi at seta perur upp í eitt træ.

Nú var tað ikki bara hesin, ið fekk skaða. Bilarnir steðga — sum vera man — at skoða mest umfatandi jóladekoratiónina í býnum, og tá er tað, at óhappið hendir: ein bilur steðgar fyri at hyggja. Bilurin aftanfyri hevur sæð ljósini fyrr, sær ikki at hin fyrri bilurin hevur steðgað og so "bang"!

Blinkljós á bilum eru annars ljós, ið verða lítið og einki brúkt her í Reykjavík, men tey eru heldur ikki til pynt...

Jú, býurin hevur mangt og hvat at bjóða. Spennandi nýtt og gamalt, men okkara Løgting er í hvussu so er eldri enn íslandska Altingið! Men her eru eisini geysarar og gosfjøll, og ikki at gloyma jøklarnar, so har er nokk meira at fara eftir. Og aftur í Reykjavík finna vit veldugar svimjihylar, jeepar við ovurstórum hjólum, súmfoniorkestur og so sanniliga eisini íslendsku opruna. Á skránni beint nú í opruni er kenda verkið hjá Giacomo Antonio Domenico Michele Secondo Maria Puccini "La Bohème" (málroynd: úttala navnið á opruni við íslandskari dialekt).

Tað hevur stóran týdning at vera væl klæddur, tá ein fer út at njóta ein góðan mentabita.

Um tað nú eru jólaljósini ella operan skal eg ikki duga at siga, men her er nógv fólk og vitjar. Nærum á hvørjum degi síggjast bólkar av bandaríkarum, sum við stórum fototólum og tjúkkum pengamappum vælnøgdir njóta av øllum tí, ið býurin hevur at bjóða. Japanarar havi eg ikki sæð enn, men teir munnu fara at koma. Her er so nógv, at tað er náttúrligt hjá einum, ið dámar væl at ferðast, at leggja leiðina til Íslands.

Og tó, tað ber neyvan til at ynskja sær nakað, ið ein ikki hevur hoyrt um. Eg kundi hugsað mær at vita, hvat tað var, ið fekk ein múgvandi amerikanara at leiga alt Hotel Holt um nýggjárið til sín og sínar vinir. Eg ivist í, um tað mundi vera ein lítil, fittur faldari við myndum av gróti og grasi.

Men eg eri eisini her. Á sama hátt sum túsund og aftur túsund eri eg endaður í hesum landi. Eg dugi ikki málið enn, men tað gongur framá. Tað er í veruleikanum tað einasta, ið er eitt sindur keðiligt. Málið bindir fólk saman, við málinum kanst tú greiða frá, spyrja og fáa svar. Eg royni ofta at siga okkurt á íslendskum, men tá svarar íslendingurin beinanvegin aftur á enskum longu áðrenn eg sjálvur eri liðugur at siga tað, eg helt eg skuldi royna at siga. Frægastu ráðini munnu helst vera ikki at falla í fátt yvir slíkt.

Her er gott at vera — eingin ivi um tað! Her hava eisini verið nógvir størri menn enn eg, men tað leggi eg ikki so nógv í. Um Gorbachev og Reagan fingu nakað serligt burturúr vitjanini her, veit eg ikki so nógv um, men eg veit, at tá eg einaferð fari hiðani aftur, fari eg at eiga eitt nýtt land, har eg eisini kann kenna meg heima.

# Er Guð deyður?

SJÓNARMIÐ
*Elinborg Joensen*

Er Guð deyður? Fyri tað fyrsta, kann tað ikki prógvast, og fyri tað næsta, so er Guð ikki deyður, hóast onkur sigur tað. So er tað kanska onkur sum sigur, at tað heldur ikki kann prógvast, at Guð ikki er deyður. Og tað er sjálvandi upp til hvønn einstakan at siga, hvat hann heldur. Men er so meginparturin av Føroya fólki heilavaskað, ella hvat? Byggja vit kirkjur og samkomuhús til ein deyðan Guð? Tíma vit at brúka okkara tíð til at hyggja at møtum og lurta eftir guðstænastuni, um Guð ikki er til? Tá hevði tað verið til fánýtis.

Oddfríður M. Rasmussen skrivaði eina grein seinasta leygardag, við júst hesari yvirskriftini: Guð er deyður. Hann var firtin um, at so nógv kristiligt tilfar er í føroysku miðlunum. Men hevur hann funnið út av, at ein knøttur er á útvarpstólinum, ið kallast on/off? Um so er, at hann ikki leggur í at hoyra kristiligt tilfar, so hví ikki sløkkja? Tað er eitt frítt val, um ein ynskir at lurta ella ikki. Tað kostar honum heldur einki eyka, at kristiligt tilfar verður varpað út. Eitt nú fíggjar Lindin seg sjálva, við gávum o.ø., uttan eitt alment oyra, og sjónvarpsguðstænastur og møtir verða tikin upp av sjálvbodnum.

Hann sigur eisini, at eingin skal siga honum, hvussu hann skal liva. Men tað ger heldur eingin. Hann hevur, enn sum áður, sín fría vilja til at tendra og sløkkja útvarpið ella sjónvarpið.

Men tað er rætt, at tá kristiligt tilfar verður varpað út, tá kemur ofta fram, hvat er rætt og skeivt at gera. Men høvdu tey ikki sagt, hvat bíblian sigur vera rætt og skeivt, tá hevði tað heldur ikki verið kristindómur. Og tað er júst kristindómur, ið verður boðaður. Kristindómur uttan kristna læru, er sum talv uttan spælireglur. Hvussu kunnu vit telva uttan at kenna spælireglurnar?



*Elinborg Joensen*

Eg veit heldur ikki, um hann veit so væl, hvat tað er hann skrivar. Dømið um, tá katolikkurin, lutheranarin, og muslimurin høvdu stolið hvør sína gularót, er ikki heilt rætt. Hann skrivar soleiðis um avleiðingarnar hjá lutheranaranum: "...Lutheranarin fær at vita, at hann hevur syndað, og at hann, tá ið tíðin kemur, skal fáa tað trupult at sleppa inn í himmiríkið, og má tí liva við syndabyrðuni í allar ævir og nakað væl aftrat..." Hetta er totalt misskilt. Lutheranarin fær at vita, at hann hevur syndað gjøgnum Guðs orð, bíbliuna. Sjeynda boð: Tú mást ikki stjala. Men! Tað verður ikki trupult hjá honum at sleppa inn í himmiríkið av hesi orsøk. Og tað er hetta, sum er kjarnin í kristindóminum. Vit kunnu fáa fyrigeving frá einum livandi Guði. Tí skal hann ikki liva við syndabyrðuni í allar ævir. Men tjóvurin hevur eisini sín fría vilja, til ikki at fáa fyrigeving. Og tá má hann liva við syndabyrðuni allar ævir.

Frían vilja. Júst sum ein hvør annar av okkum. Vit hava øll okkara fría vilja. Ikki einans til at avgera um vit lurta eftir útvarpinum, ella ikki. Men eisini um vit vilja trúgva ella ikki.

Men so leingi vit kunnu skifta millum rásirnar, hvørt tað so er útvarp ella sjónvarp, so haldi eg tað er í lagi, at hava kristiligar sendingar, eins og annað tilfar. Tað er jú upp til hvønn einstakan, hvat hann velur at hyggja ella lurta eftir.



gult cyan magenta svart




# RÆTTING

Lýsingin her niðanfyri var eisini í bløðunum – Norðlýsinum, Sosialinum og Dimmalætting, í gjár. Í teimum lýsingunum vóru dagfestingarnar komnar skeivt fyri.

Røttu dagfestingarnar eru í lýsingini her niðanfyri.

**Lýsararnir**

# ÚTBJÓÐING

Fyri *Sjálvognarstovnin undir Kráarbrekku* í Klaksvík verður arbeiðið í sambandi við bygging av eldraíbúðum hervið boðið út alment.

Arbeiðstøkurnar eru:

1. Jørð, kloakk- og betongarbeiði
2. Timbur- og snikkaraarbeiði
3. Múraraarbeiði
4. Málaraarbeiði
5. Gólvarbeiði
6. HVS-arbeiði
7. El-arbeiði

Útbjóðingartilfarið fæst frá mánadegnum 05. mars við at gjalda kr. 5.000,- í veð á konto 4132607 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi mikudagin tann 07. mars og venda sær til Fuglø Arkitektar við váttan um, at upphæddin er goldin.

Lisitatiónin verður hildin mánadagin tann 02. apríl í ár kl. 15.00. Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

Projektleiðsla og arkitektarbeiði
F U G L fl A R K I T E K T A R
Gerðagøta 12, FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 78 87 - Fax 45 78 97

Berandi konstruktiónir
**SÁMAL JOHANNESEN**
Ráðg. verkfr.
Geilin 22, FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 68 37 - Fax 45 68 37

HVS og ventilatión
**P/F SOFUS M. JAKOBSEN**
Ráðg. verkfr. F.R.I.
J. H. Schrøtersgøta 22, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 35 22 - Fax 31 06 22

El-innleggingar
**ODDBJØRN VÁGSLÍÐ**
EL-Anlegg
Á Brekku 1, FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 53 73 - Fax 45 78 74

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Norðoya Røktarheim

**700 Klaksvík**

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til Norðoya Røktarheim, frá 15. mai til 30. sept. 2001. Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrasystir, sjúkrahjálparar og almanna- og heilsuatstøðarum.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisatión, verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 2. apríl 2001.

# Frá Føroya Psoriasisfelag

**Nýggj viðgerðarferð til Bláalónið í Íslandi verður frá 27.04. til 25.05.**

Tey, ið hava tørv á viðgerð og ynskja at verða við á omanfyrinevndu viðgerðarferð, verða biðin um at fara til egnan kommunulækna at fylla út umsóknarblað. Umsóknarblaðið skal vera húðlæknanum í hendi í seinasta lagi 12.03. Kommunulæknin sendir umsóknarblaðið til húðlæknan. Húðlæknin viðger allar umsóknir og fáa umsøkjarar boð frá honum at møta til viðtalu.

**Føroya Psoriasisfelag**
Tlf. 424179

# Grannastevna

Lýst verður til grannastevnu í bygdarhúsinum á Strondum mánadagin 5. mars 2001, kl. 19.00.

**Skrá:**
Innlagt mál um innangarðs útskifting av bygdini.

**Sjóvar Kommuna**

# Grannastevna

Lýst verður til grannastevnu í missiónshúsinum á Selatrað mikudagin 7. mars 2001, kl. 19.00.

**Skrá:**
Viðarlundin o.a.

**Sjóvar Kommuna**

# Longur opið á
## Kommunalu Brennistøðini

Endamálið við at hava opið longur, er at lættari skal verða at sleppa av við burturkast.

Jarn frá vinnuvirkjum og bilvrak verður ikki móttikið leygardag.

**Opið er hvønn leygardag frá kl. 13.00-17.00.**

Umframt er opið:
mánadag, mikudag og fríggjadag: **kl. 08.00-17.00**
týsdag og hósdag: **kl. 08.00-20.00**

Tórshavnar kommuna

Kommunala Brennistøðin





# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at starvast 30 til 35 tímar um vikuna frá 01.04.2001 ella eftir avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, lønt í lønarflokki 11/13. Harafturat verður veitt ein ikki eftirløngevandi viðbót.

Vøggustovan er ein sjálvsognarstovnur við 33 børnum í aldrinum 1 til 3 ár.

Umsókn við avriti av prógvi og møgulig viðmæli skal vera okkum í hendi í seinast 19.03.2001.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran ella Lauru á telefon 313131.

**Vøggustovan á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO-100 Tórshavn

Hava tit onki hoyrt frá okkum áðrenn 26.03.2001 er starvið sett til annan umsøkjara.

# Skrivstovu-/ Teknistovuhølir

Góð og ljós skrivstovuhølir/teknistovuhølir til leigu.

Talan er um 150 $m^2$ í einari hædd við fundarhøli, skrivstovum, køki og tveimum toilettum. Góð parkeringspláss.

Nærri upplýsingar á telefon nr. 311139 ella 315380.